***Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?***
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



# Ókeypis konsert í Reinsarínum á Altjóða Sálarheilsudegnum

**Komandi fríggjadag skipar Sinnisbati í samband við Altjóða Sálarheilsudagin fyri ókeypis konsert í Reinsarínum við millum annað Kára P, Tinganest, Lenu & Niclas og Boys in a Band. Konsertin kallast Mind the Music**



*Fríggjakvøldið 10. oktober klokkan 22.00 er konsertin Mind the Music í Reinsarínum, har millum annað Boys in a Band skulu framføra. Boys in a Band er síðsti bólkurin hetta kvøldið og spælir klokkan 01.20, beint aftaná Tinganest*
*Mynd: Kristfríð Tyril*

**Konsertin byrjar kl. 22.00 stundisliga, og tað er ókeypis atgongd**

**Skráin er hendan:**

**22:00 – 22:30**
Líggjas & Flóvin
**22:40 – 23:10**
Kári P
**23:20 – 23:50**
Heiðrik á Heygum
**00:00 – 00:30**
Lena & Niclas
**00:40 – 01:10**
Tinganest
**01:20 – 01:50**
Boys in a Band

Fríggjadagin 10. oktober er Altjóða Sálarheilsudagur, og eins og aðrastaðni kring heimin verður eisini her í Føroyum skipað fyri tiltøkum, sum á ymiskan hátt skulu slóða fyri størri opinleika og kunnleika um sálarheilsu.

Í ár er heitið á Sálarheilsudegnum "Nem Sálina", og hendan dagin verður ein røð av tiltøkum ymsastaðni í Tórsgøtu, ið eru viðkomandi fyri heitið.

Tónleikur er eitt av evnunum, sum nema sálina, og í samstarvi við fleiri av okkara best viðurkendu tónleikarum verður endabrakið á Sálarheilsudegnum ein fjølbroytt konsert til frama fyri størri tolsemi og opinleika í samfelagnum, nevniliga Mind the Music, ið Sinnisbati stendur aftanfyri.

Bólkarnir, ið framføra, eru: sangskrivararnir Líggjas & Flóvin, ið vit kenna best úr bólkinum Deja Vu, og sum nú eru farnir í gongd við sítt egna projekt og at framleiða egið tilfar; ein av okkara kærastu trubadurum, Kári P, ið hevur víst væl og virðiliga seinastu árini, at hann kann blotna eitthvørt hjarta við sínari eykendu rødd og vøkru løgum; komponisturin og film-makarin Heiðrik á Heygum, ið júst er heimafturkomin úr Danmark og hevur sína fyrstu konsert her á landi í langa tíð; heitu og vøkru Lena og Niclas, sum altíð megna at hugtaka hvørt lurtandi oyra við fangandi løgum og søgusigandi tekstum; Tinganest, hvørs ómissandi vilji at tendra í veitsluhugna og góðan hýr er sikkur í at blíva eitt hitt hetta kvøldið; og síðst men ikki minst orkuríku Boys in a Band, sum elska at spæla og undirhalda við sínum framúrskarandi løgum og hvørja einastu ferð gera tað av øllum hjarta.



*Lena og Niclas fara á pallin á midnátt í annaðkvøld til hesa ókeypis konsertina, ið hevur til endamáls at varpa ljós á og skapa meira opinleika fyri sálarsjúkum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

minnið á fólki, tí væl varð sungið við. Og eins og Gestir spældu ORKA nógv nýtt, ið boðaði frá góðum.

**Fyrstu neiligu orðini nakrantíð**
Alt tað, eg nakrantíð havi lisið um ORKA, hevur bara verið gott. Ikki eitt neiligt orð. Og í summar skrivaði eg eitt ummæli av teirra framførslu á G MINI!, har jaligu lýsingarorðini stóðu í kø. Einki ringt at finna. Men meðan eg sat á harða gólvinum á Norðurbryggjuni og lurtaði, helt eg eina løtu, at sangirnir líktust eitt sindur ov nógv. Ella tað var serliga sangurin hjá Kára Sverrissyni, ið eg helt vera eitt sindur monotonan. Saknaði eitt sindur størri breidd í tónastrekkinum, fyri at gerast heilt tekniskur. Nógv av tí, sum Kári syngur, eru yrkingar av ymsum slag (m.a. av Jóanes Nielsen), og til tíðir ljóðaði tað meiri sum upplestur við lagi enn veruligur sangur. Ov lítið, ið varð sitandi í mínum høvdi.

**Stoltur heim í song**
Tá ið báðar framførslurnar vóru av, stillaði DJ Knýtil (Knút Háberg Eysturstein) seg handan knøttar og teldu og spældi sín tónleik, sum hann eisini hevði gjørt áðrenn og ímillum framførslurnar. Og aftaná enn meiri prát og enn meiri látur, fór eg vælnøgdur og – av onkrari undarligari orsøk – stoltur heim í song.



*ORKA og Gestir høvdu seinasta fríggjakvøld konsert í Norðurbryggjuni í Keypmannahavn*
*Myndir: Sunva Eysturoy*